| Gerðabók býráðsins | |
|---|---|
| Fundardagur: | 28. november 2019 |
| Býráðsfundur nr. | 11/2019 |
| Borgarstjóri | Sonni á Horni |
| Fundarskrivari | Marin S. Thomsen |
| Journal nr. | 19/00064 |

Ár 2019 tann 28. november kl. 19.00 varð býráðsfundur hildin í bønhúsinum á Hellunum, hetta sambært skriv frá borgarstjóranum, dagfest 22. november 2019 um innkalling til fundar.

**Møtt vórðu:**

Sonni á Horni
Eivin Breiðaskarð
Kristian Petersen
Ólavur Larsen
Árant Berjastein
Magni Herason Jøkladal
Sigurð S. Simonsen
Eyðun á Lakjuni
Edva Jacobsen

**Skrivari:** Marin Sólheim Thomsen, fíggjarleiðari

**Mál nr. 39/2019.**

**Uppskot til fíggjarætlan kommununar fyri 2020.**

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt uppskot til fíggjarætlan kommununar fyri 2020 á fundi 13. november 2019, og loyvir nevndin sær hervið vísandi til § 39, stk. 1 og 2 í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mai 2000 um kommunustýri at leggja endaliga uppskotið fyri býráðið til avgerðar.

Nevndin mælir býráðnum einmælt til at taka undir fyri fyriliggjandi uppskoti, sum javnvigar við kr. 185.585.000,00. Barnafrádrátturin er ásettur til kr. 7.500,00 pr. barn, sum er kr. 1.000,00 hægri enn fyri 2019, meðan skattaprosentið er ásett at verða sama nevniliga 21,5%.

Talan er um nettorakstrarútreiðslur upp á kr. 62,281 mió í mun til kr. 58,437 mió í 2019, so talan er um ein vøkstur í rakstrinum upp á kr. 3,844 mió, svarandi til 6,57%, sum fyri stóran part starvar frá munandi øktari rakstrarjáttan til øki 3 «Børn og ung» og til lønarvøkstur á øllum økjum. Nevnast kann, at øktu útreiðslurnar á øki 7 «Kommunal virki» stava fyri mesta partin av, havnin sambært loðslógina nú rindar beinleiðis til loðsflutningsbátar fyri tænastur, og síðan fakturerar tænastuna út til skipini/reiðaríini/agentar.

Nettoíløgurnar verða mettar til kr. 79,646 mió móti kr. 71,805 mió í 2019, so talan er um ein íløguvøkstur upp á kr. 7,841 mió svarandi til 10,9%.

Rentuútreiðslurnar eru settar til kr. 3,4 mió, sum er ein hækking upp á kr. 500.000,00 í mun til 2019, avdráttirnir av lánum eru hækkaðir við kr. 1,0 mió úr kr. 5,0 mió upp í kr. 6,0 mió.

Inntøkurnar av A+B skatti verða mettar til kr. 67,561 mió móti 61,162 í 2019, so talan er um eina hækking upp á kr. 6,399 mió svarandi til 10,46%. Skattur av kapitaleftirlønum er settur kr. 12,934 mió, og skattur av DIS og FAS til kr. 2,955 mió, so talan er um endurgjøld úr landskassanum til eldraøkið upp á kr. 15,864 mió móti 14,3 mió í 2019.

Nýtslan av innistandani/framflytingar av ónýttum íløgujáttanum verður tilsamans kr. 26,486 mió, sum eru framflytingar av ónýttum játtanum, eitt nú til bygging av nýggjum barnaskúla, útbygging av Vesturstovu, til byggibúningar, nýtt ruskøki vm. Lántøkan verður kr. 22.381 mió móti kr. 22,7 mió. í 2019.
Fíggjarnevndin hevur annars viðgjørt uppskot til fíggjarætlan 2020 á fundi 20. august 2019 (karmar 2020), á fundum 22. oktober og 05. november 2019. Temadagar býráðsins hava verið hildnir tann 11. og 12. november 2019 á Dugna á Kambsdali. Býráðið hevur viðgjørt uppskotið til fíggjarætlanarkarmar fyri 2020 á fundi 29. august 2019.

Hjálagt verður sent eitt álit frá fíggjarnevndini í sambandi við nærri útgreiningar av uppskotinum til fíggjarætlan kommununar fyri 2020.

Avgerð: **Mál nr. 39/2019.**

Býráðið samtykti tilmælið frá fíggjarnevndini um fíggjarætlan kommunurnar 2020, við 8 atkvøðum fyri og einari atkvøðu ímóti. Ímóti atkvøddi Árant Berjastein. (8-1)

**<u>Mál nr. 40/2019.</u>**

**Umsókn um byggiloyvi til Vesturstovu.**

Umsitingin hevur gjørt høvuðsprojekt til útbygging av Vesturstovu. Í hesum sambandi søkir verkætlanarleiðarin um byggiloyvi til verkætlanina, sum umfatar bæði 1. og 2. byggistig. Hetta er fyri at sleppa undan at søkja um byggiloyvi í tveimum umførum.

Umsitingin hevur móttikið umsókn við tilhoyrandi tekningum.

Ynskiligt er at fáa orkuvirðið fyri ymisku bygningslutirnar eftirsendar.

Vitandi um, at hetta er ein útbygging av einum gomlum bygningi, so kann samlaða orkuramman ikki yvirhaldast. Men bygningslutirnir yvirhalda orkukrøvini hvør sær.

Upprunin til málið. Útbygging av Vesturstovu til fýra búpláss aftrat verandi búplássum.

Grundarlag: BK 17 og byggisamtyktin.

Møgulig fylgisskjøl: FK. J.nr. 19/00389-1. Umsókn um byggiloyvi við tilhoyrandi tekningum.

Tekniska nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 14. november 2019 og mælir til at taka undir við tilmælinum um at geva byggiloyvi sambært fyriliggjandi umsókn.

**Avgerð: <u>Mál nr. 40/2019.</u>**
Býráðið samtykti tilmælið frá teknisku nevndini og geva byggiloyvi sambært fyriliggjandi umsókn, við 8 atkvøðum fyri og einari atkvøðu ímóti. Ímóti atkvøddi Sigurð S. Simonsen. (8-1)

**<u>Mál nr.41/2019.</u>**

**Mál viðvíkjandi eykajáttan til byggibúning av grundstykkjum á Bøvegi.**

Tekniska nevndin hevur á fundi tann 31. oktober 2019 viðgjørt arbeiðið við at planera grundstykkini við Bøveg, sum nú eru komin væl áleiðis.

*Frágreiðing um málið:*

Eykaveiting í sambandi við tvørennur, útreiðslur til matrikulering, príshækkingar av tilfari og tekniskar installatiónir til tvíhúsini. Ætlanin varð at planera fyri 12 grundstykkjum, men hetta er síðan broytt soleiðis, at 3 grundstykkir eru til tvíhús, soleiðis at vit fáa 15 matriklar ístaðin fyri 12.

Tilboðið var áljóðandi kr. 2.978.315,00, og verður meirkostnaðurin mettur at verða kr. 597.945,60. Ráðgevingin er mett at kosta kr. 120.000,00, og kostnaðurin av matrikuleringini er mettur at kosta kr. 30.000,00.

Samlaði kostnaðurin er mettur til at verða kr. 3.957.277,00 íroknað projektering og eftirlit og matrikuleringskostnað við 6,25% mvg.

Umsitingin mælir til at fíggja meirkostnaðin av rakstrarstaði 637, sum er íløgukontoin til nýggjan kirkjugarð.

Galdandi lóggáva og reglur á økinum eru: «Byggisamtyktin og matrikullógin».

Tekniska nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 31. oktober 2019 og tekur undir við tilmælinum frá Umsitingini og heitir á fíggjarnevndina/býráðið um at góðtaka eykajáttanina/umflytingina.

Fíggjarnevndin hevur móttikið skriv frá teknisku nevndini, dagfest 31. oktober 2019 um omanfyri nevndu viðurskifti, at tað er neyðugt at fáa til vega eina eykajáttan upp á kr. 597.945,60 til nevnda arbeiði, sum fyri størsta partin umfatar eyka arbeiði sambærtsáttmála við arbeiðstakara, ráðgeving, matrikulering vm.
Á konto rakstrarstaði 632 "Kommunal útstykking" eru avsettar á konto 1341-00 kr. 5,0 mió, meðan roknað hevur verið við eini inntøku konta 4210-00 upp á kr. 2,5 mió, so talan er um nettoútreiðslu upp á kr. 2,5 mió.

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt málið á fundi 13. november 2019, og mælir nevndin býráðnum til at veita eina eykajáttan upp á kr. 597.945,60 til rakstrarstað 632 konto 3141-00 "Kommunal útstykking-byggibúning bústaðir".

Sosatt hækkar játtanin á rakstrarstaði 632 "Kommunal útstykking" á øki 6 úr kr. 5,0 mió upp í kr. 5.597.945,60, eins og roknað verður við somu inntøku sum mett á kr. 2,5 mió. fyri sølu av grundstykkjum vm.

Vísandi til § 41, stk. 2 í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mai 2000 um kommunustýri við seinni broytingum, so verður útreiðslan fíggjað av umflyting frá rakstrarstaði 637 "Kirkjugarður íløga", har avsettar eru kr. 1,0 mió í inniverandi fíggjarári. Sostatt lækkarar henda játtan við kr. 597.945,60 niður í kr. 402.054,40.

Í hesum sambandi verður somuleiðis eisini víst til § 41, stk. 1 í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mai 2000 um kommunustýri við seinni broytingum.

Ein eykajáttan sum henda førir ikki útreiðslu við sær, sum hevur beinleiðis ávirkan á roknskap kommununar fyri 2019, við tað at henda verður fíggjað av umflyting av íløgujáttanum á økið 6 "Teknisk mál".

Tá ið talan er um eina eykajáttan, sum lýst er omanfyri við eini umflyting, skal málið hava 2 viðgerðir í býráðnum, hetta sambært § 41, stk. 2 í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mai 2000 um kommunustýri við seinni broytingum, og við hvørja eykajáttan skal verðá víst á, hvussu hon skal verða fíggjað.

Samtykt eykajáttan skal verða kunnað landsstýsismanninum í fíggjarmálum innan 3 gerandisdagar aftaná, at henda eru samtykt við 2. viðgerð, hetta vísandi til § 53, stk. 2 3) í oman fyri nevndu lóg.

**Avgerð: Mál nr. 41/2019.**
Býráðið samtykti einmælt tilmælið frá teknisku nevndini og fíggjarnevndini soleiðis, at málið verður beint til aðru viðgerð á næsta býráðsfundi. (9-0)

**Mál nr. 42/2019.**

**Prísáseting av grundstykkjum á Kambsdali.**

Útstykkingin á Kambsdali er um at verða liðug, og nú er eftir at fáa matrikulerað 1. Byggistig, sum umfatar 8 grundøkir íalt. Eftir er eisini at prísáseta grundøkini.

Upprunin til málið: Prísáseting av grundøkjum, solieðis at eigarar av grundøkjum kunnu biðja ujm fígging.

Grundarlag: Matrikullógin. Møgulig fylgisskjøl, sum er J.nr. FK 19/00385-1. Eitt sindur um útstykkingina og plantekning.

Tekniska nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 14. November 2019 og mælir til at áseta søluprísin fyri hvørt grundøki sær til kr. 200.000,00, galdandi fyri verandi útstykking á Kambsdali.

**Avgerð: Mál nr. 42/2019.**
Býráðið samtykti einmælt tilmælið frá teknisku nevndini um at lata søluprísin á grundøkjunum á verandi útstykking á Kambsdali verða kr. 200.000. (9-0)

**Mál nr. 43/2019.**

**Prísáseting av grundøkjum til tvíhús á útstykkingini á Bøvegi.**

Útstykkingin á Bøvegi er um at verða liðug, og nú er bert eftir at matrikulera útstykkingina og at prísáseta grundstykkini, sum eru ætlað til tvíhús.

Tey vanligu grundstykkini eru prísásett til kr. 300.000,00 pr. stk.

Í útstykkingarætlanini eru seks grundstykkir, sum verða 300 m2 hvørt. Byggikostnaðurin fyri planering av grundstykkjunum fyri einkulthús og fyri tvíhús er tann sami.

Upprunin til málið: Søla av grundøkjum.

Grundarlag: Møgulig fylgisskjøl FK. J.nr. 19/000386-1. Eitt sindur um útstykkingina og plantekning.

Tekniski leiðarin mælir til at áseta søluprísin fyri hvørt av grundstykkjunum til tvíhús til kr. 150.000,00.

**Avgerð:** **Mál nr. 43/2019.** Býráðið samtykti einmælt tilmælið frá tekniska leiðaranum um at áseta grundstykkjaprísin til tvíhús til kr. 150.000. (9-0)

**Mál nr. 44/2019.**

**Uppskot til val av arbeiðsbólki í sambandi við nýggja heilsumiðstøð.**

Á fundi í sosialu nevndini tann 5. November 2019 viðgjørdi nevndin málið um "Uppskot um val av arbeiðsbólki í sambandi við nýggja heilsumiðstøð.

Í sambandi við avgerð býráðsins um, at gamli FK bygningurin skal verða nýttur til heilsumiðstøð, eftir at nýggi barnaskúlin er tikin í nýtslu, so er heitt á sosialu nevndina um at viðgera málið um val av arbeiðsbólki.

Sosiala nevndin viðgjørdi málið á fundinum, og hevur í uppskoti at velja hesi í arbeiðsbólkin:

Árant Berjastein, formann í sosialu nevndini
Sonna á Horni, borgarstjóra
Ann Fuglø, byggifrøðing
Irenu Olsen, sosialdeildarleiðara
Kristu Jørmundsson, kommunulækna.

Sosiala nevndin heitir á býráðið um at taka undir við uppskotinum til val av omanfyri nevndu politikarum og starvsfólkum.

**Avgerð:** **Mál nr. 44/2019.**
Á býráðsfundinum kom uppskot frá Sigurði S. Simonsen um, at útvíða arbeiðsbólkin við einum umboði fyri minnilutan og hevði Edvu Jacobsen í uppskoti sum nýggjan lim. Býráðið samtykti einmælt broytingaruppskotið frá Sigurði S. Simonsen. Arbeiðsbólkurin telur sostatt 6 limir. (9-0)

Bókin lisin. Fundurin lokin kl. 21.

Eivin Breiðaskarð

Kristian Petersen

Árant Berjastein

Magni Herason Jøkladal

Ólavur Larsen

Eyðun á Lakjuni

Sigurð S. Simonsen

Edva Jacobsen

Sonni á Horni

Skrivari:

Marin Sólheim Thomsen